# FK fær umsíðir byggiloyvi

**Hóast býráðið er sinnað at geva Keypssamtøkuni eitt grundøki í Klaksvík, eru øll ikki eins fegin um tað. – Hetta er sum eitt plástur uppá sárið, sigur Kári Kjelnæs, sum í síni tíð sat í býráðnum**

BYGGING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið fer Klaksvíkar kommuna at geva Keypssamtøkuni byggiloyvi nýggjan handilsbygning.

Tekniska nevnd hjá býráðnum hevur mælt til, at Keypssamtøkan fær eitt øki norðanfyri Statoil-støðina í Nólsoyar Páls Gøtu.

Á hesum staði hava klaksvíkingar bátar sínar standandi, og tí mugu hesir nú víkja fyri handilsbygninginum.

Keypssamtøkan hevur fyri mongum árum síðani søkt um byggiloyvi í miðbýnum í Klaksvík, men higartil er hetta ikki vorðið til nakað.

Ikki fyrrenn nú – á fundi í annaðkvøld – sær umsíðir út til at hetta kann gerast veruleiki.

### Fiskur ella handil

Í einum lesarabrævi í farnu viku vísti Kári Kjelnæs, fyrrverandi býráðspolitikkari í Klaksvík á, at tað líkist mestsum einum plástri á sárið at geva Keypssamtøkuni byggiloyvi á hesum staði og beint nú.

- Nú er so ætlanin at geva byggiloyvi á eitt sera sentralt og í forvegin upptikið øki. Hetta økið er ein forlonging av verandi fiskaríhavn á Stongunum, skrivar Kári.

Her eru bátabrúgvar við møguleikar at seta bæði bátar og bilar frá sær. Og hetta er haraftrat eitt vakurt øki, sum ætlanin nú er at geva Keypssamtøkuni.

- Skal byggjast, má byggjast við skynsemi, sigur hann.

### Skilaleyst

Millum tað vanliga fólkið í Klaksvík er somuleiðis stórur áhugi fyri hesum málinum – og kanska mest stórur ivi um, tað yvirhøvur er rætt at lata Keypssamtøkuna byggja júst á hesum staði.

Í eini viðmerking til tjakið í Norðlýsinum sigur ein klaksvíkingur, at tað er skilaleyst at byggja ein FK-handil við bátabrúgvarnar.

Fyri henda klaksvíkingin kemur avgerðina at fáa fleiri fylgjur:

- Eingin hugni longur við bátabrúgvarnar
- Ein stórur kolossur kemur at liggja tætt við bátarnir
- Onki øki at seta bátar á
- Eini seks húski fram við Nólsoyar Páls Gøtu missa útsýnið út á vánna

- Tá Býráðshúsið sjálvt varð bygt, var á sama hátt bygt beint upp fyri vindeyga hjá øðrum. Ótrúligt, at man ikki kann læra av slíkum. Grannarnir eiga í hesum føri at kæra, sigur hesin klaksvíkingurin.

Gongst sum ætlað fer helst ein nýggjur FK-handil at liggja á hesum staði í framtíðini.



*Økið við bátabrúgvarnar í Klaksvík (sí sirkul) hevur verið bátapláss hjá klaksvíkingum. Nú kemur eftir ætlan ein FK-handil at liggja her*

*Mynd: Norðlýsið*

## Lumpa og lirka

SÓLFRÍÐ FJALLSBAK

Flogvøllurin er okkara stoltleiki her vestri, har eru nógv arbeiðspláss, og tað verður ein stórur smeitur fyri oynna, um øll hesi arbeiðspláss skulu flytast haðani. Tí fara vit at verja borg so leingi tað skal til! Men Fólkaflokkurin roynir so smátt at sníkja seg inn í millum við ymiskum ásetingum, sum noyða flogvøllin burtur haðani. Í samferðsluætlanini stendur, at tað í 2015 skal vera í mesta lagið 30 minuttir úr miðstaðarøkinum til flogvøllin… ja, nu skal eg ikki síggja tað ringasta beinavegin, tað kann jú gerast upp á ymiskar mátar, eg meini, man má duga at síggja loysnir ikki bara forðingar:)

1. hála Vágoynna nærri Tórshavn
2. gera tunnil frá Oyragjógv til Vatnsoyrar og seta hámarksferðina upp á vegunum
3. gera Sandavág til høvuðsstað ella
4. gera flogvøll á Glyvursnesi

So fáa teir ásett eina samtykt, um at nú skal kannast, hvar flogvøllurin kann vera 2200m, er møguleiki í Sørvági?…nei. Søltuvík?…nei á Glyvursnesi? …ja, åh vit eru genialir!!! so noyðst vit at kanna tann møguleikan.

Bjarni Djurholm og Poul Michelsen, er tað sikkurt, at tað er ein fyrimunur at hava ein so langan? Vága Floghavn hevur lutfalsliga ikki so nógvar avlýsingar ímun til aðrar floghavnir í heiminum. Sum nú er hava vit eina góða tænastu við fráferðum fleiri ferð um dagin. Tað kann ikki vera okkara trupulleiki, at Poul Michelsen og Bjarni Djurholm ikki tíma at koyra í 45 minuttir, tað er tað, tað tekur, um tú koyrir við hámarksferðini úr Havn til flogvøllin. Vit fara ikki at lata flogvøllin bara tí. Og hvussu við allari ferðsluni, hvat skulu tit gera við hana? Havnarfólk róptu varskó, tá tosað varð um Skálafjarðartunnil, tí tað skuldi ikki verða pláss fyri ferðsluni, og so vilja tit hava ein flogvøll!! Og hvør roknar cost benefit út? Vit tosa um fleiri milliardir, nær verður tað lønsamt at gera ein flogvøll á Glyvursnesi? Og fara vit at fáa eins nógvar fráferðir ella verður tað 4 -5 ferð um vikuna tí nú kunu vit brúka so stór flogfør?

Nú bleiv tað so heldugt, at Føroyar blivu gjørdar til eitt valdømi, soleiðis yvir eina nátt, so nú nýtist Jørgin Niclasen, sum annars hevur staðið og reypað á hvørjum valfundi fyrr, um alt hann hevur gjørt fyri oynna, ikki at hugsa so nógv um flogvøllin meira, hann er eisini blivin formaður í flokkinum og fólkafloksmenn eru so autoriterir, so hann er tryggjaður óansæð.

Nú skal eg ikki geva Fólkaflokkin heiðurin av, at tað bleiv eitt valdømi, tað vóru jú øll sum sita so heitt og gott á tingi, og sum longu hava fingið tí sokallaðu løgmanseffektina (hóast hon ikki sá út til at rigga til fólkatingsvalið), sum vildu geva øllum Føroyum høvið at velja júst tey, tí tey eru so ófør at fáa óvanliga nógv uppskot ígjøgnum í einum valári.

## "Eitt er at stýra. Annað er skip at føra"

HJALMAR N. POULSEN



Hóast orðini ikki bókstaviliga viðvíkja Smyrli sum so, kunnu tey í ávísan mun setast í samband við síðstu umsitingarligu heilabløðingarnar í Innlendismálaráðnum, nú ráharrin greitt verður lagdur undir magtmisnýtslu á embatistigi. Ivasama heiðurin skal hann sjálvur hava tiltuskað sær, við at føra "vina og kenninga-politikk" í valdømi sínum, upp á bekostning av almennum gjaldoyra. Hevði tað verið tað einasta, so var kannska ikki verri enn ilt.

Lukkuliga óvitandi um, hvat veruliga fer fram, er hann gott ígongd við at avheysa Strandferðsluna sum sjálvstýrandi stovn. Høvd eru longu farin á rull, men av skeivum kroppum.

Nú luppur løgmanns er funnin fram, verður spennandi at vita, hvat eyga hesuferð fæst á.

Ráharrin hevur skákað seg sjálvan, við ósakliga at hava givið embatisboð. Tað, at lúgva seg frá syndunum á landsins hægsta røðarapalli, hevur áður verið gjørt upp til fleiri ferðir og eisini við góðum úrsliti. Tí í Føroyum er slíkt vanligt.

Spurningurin er so, hvar er moralurin? Eg og fleiri við mær leita enn, men finna hann ikki.

Tað er nú allíkavæl gott, at løgtingsval stendur fyri duri.

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 341800

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Koyrikort?
Teoriskeið til persónbil byrjar **mikudagin 28. november kl. 17.00**
Teoriskeið til lastbil, buss og trailara byrjar **mikudagin 28. november kl. 19.30**
FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI
John A. Christiansen tel 21 47 75
Rúni Christiansen tel 21 47 65
Jekaragøta 10 • Tórshavn